# Mæla Tjóðveldinum til at standa við givin lyftir um Sandoyartunnilin!

MEIKEN KRABENHØFT
Forkvinna Sandoyar Tjóðveldisfelag

**Nevndin í Sandoyar Tjóðveldisfelag hevur í skrivi til Tjóðveldi, mælt øllum liðum í flokkinum at standa við, og virða givin lyftir um Sandoyartunnilin**

Tjóðveldi hevur altíð verið flokkur, sum tekur støði í at allir føroyingar eiga rættin til landið, og harvið rættin til eitt javnt tænastustøði, hjá øllum borgarum landsins. Samstundis er tað eitt stórt brot á rættartrygdina í einum upplýstum samfelag, at skrykkja vónir og vantanir, samtyktar í lóg, undan einum av veikastu fólkabólkunum í landinum, Sandoyingum og Suðuroyingum. Ein støða sum ikki vekir virðing fyri, og álit á politisku skipan landsins.

Sandoyar Tjóðveldisfelag ásannar týdningin av økismenningini, og sær samanbindingina av landinum við vegum, tunnlum og brúm, sum ein tann týdningarmesta táttin í royndini at vekja lív kring landið, og harvið vaksa um samhaldsføstu tjóðina Føroyar. Henda menning byrjaði fyri nógvum árum síðani, og hevur verið fortreytin fyri framburði í Føroyum. Eingin orsøk er til at seta suðurpartin av landinum eftir, nú vunnu rættindini hjá fjøldini norðanfjørðs, skulu gerast veruleiki hjá føroyingum sunnanfjørðs.

Sandoyar Tjóðveldisfelag metir svart/hvíta kjakið um bleyt og hørð virðir, seta partar av fólkinum upp móti hvørjum og fremur hettar ikki søk føroyinga í tjóðskaparstríðnum.

Sum fyrsti flokkur setti Tjóðveldi Sandoyartunnilin í valskránna. Hetta var til løgtingsvalið í 2004.

Sandoyar Tjóðveldisfelag heitir tí staðiliga á leiðslu flokksins, landsstýriskvinnur og ,- menn, tingkvinnur og ,- menn, um at finna góða samstarvsandan, og virða løgtingslógina sum tryggjar Sandoynni og Suðuroynni, javnbjóðis rætt til føðilandið Føroyar.

**Við samhaldsfastari kvøðu**

# Friðarligt rán, ella?

HENRIK OLD



**3. partur**

Tað má verða áhugavert hjá føroyskum pensionistum og øðrum at fáa at vita, hví stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (Samhaldsfasta) ikki betalur út til pensiónistar, tað sum verður goldið inn í grunnin. Sum nevnt í míni fyrstu grein um Samhaldsfasta, so varð útgangsstøðið, at 95% av tí, ið kom inn í grunnin, skuldi gjaldast út aftur. Seinni varð lógin broytt so einki prosenttal fyri útgjald var nevnt í lógini.

Av eini ella aðrari orsøk hevur stýrið fyri grunnin avgjørt, at í 2007 einans skulu gjaldast 62% av tí, sum inngoldið verður útaftur til pensiónistar, sostætt fær hvør pensiónistur uml. 1.000 kr. ov lítið um mánaðin.

Áhugavert hevði verið at fingið at vita frá tí tigandi stýrinum, um hesin mín pástandur er skeivur.

Stýrið hevur sum eg skilji tað, eftirhildið góðar 500 mió kr., sum man ætlar at gjaldað út um eini 20-25 ár.

Helst sær stýrisformaðurin seg sjálvan sum ein Onkel Joakim, sitandi í einum peningatanga, hvar milliónirnar vaksa honum upp um oyruni. Tá fyrsta milliardin er samlað inn, fer stýrið helst at finna uppá, hvat man skal brúka pengarnar til.

Helst verður tað tá ov trongt í Landsbankanum (sum nú umsitur Samhaldsfasta), og so verður neyðugt at byggja ein umsitingarbygning, fyri tað sum annars skuldi fari til pensiónistarnar.

Als er væl eitt gott dømi um, hvussu tað kann ganga. Øll hava goldið við góðum huga til Als fyri at hava nakað at standa ímóti við. Nú er so val í grunninum, at Als ætlar at byggja ein luksusbygning fyri at húsa sær sjálvum. Umsitingarútreiðslurnar vaksa jú so hvørt sum arbeiðsloysið minkar.

**Aftur til Samhaldsfasta**

Tað kundi tað verið áhugavert at spurt onkran í stýrinum, um man heldur, at tey sum bara hava fólkapensiónina at líta á fáa nokk?

Í øðrum lagi eru oljuprísirnir ikki enn nóg høgir til, at man heldur at pensiónistarnir hava brúk fyri teimum 1.000 kr. meira um mánaðin?

Eg haldi tað verða ergiligt, at tað sum skuldi verða ein góð ætlan, sum hevur kravt nógva politiska togan, skuldi enda í einum pamparaveldið.

# Umhvørvisliga og fíggjarliga burðardygg handfaring av burturkasti

REGIN JACOBSEN
nevndarformaður IRF



Fremsta uppgávan hjá IRF er at virka fyri at burturkast og annað órudd í limakommununum verður beint burtur á ein skilagóðan hátt, og at umhvørvið verður vart sambært lógum og forskriftum. Ein partur av hesi uppgávu er at syrgja fyri, at sum mest fæst burturúr tilfeinginum, sum ruskið í veruleikanum er.

Fortreytirnar fyri verandi bygnaði vóru kannaðar í áttatiárunum, og úrslitið av tí arbeiðinum eru tær báðar brennistøðirnar sum seinastu 20 árini hava brent alt rusk í Føroyum. Tað kann hugsast at fortreytirnar eru broyttar og at nýggjar fortreytir skulu leggjast til grund, tá munandi útbygging skal gerast um eini 10 ár.

Bæði IRF og KOB framleiða ídag umleið 3-4 MW av fjarhita, og hava nakað av eyka fjarhita sum ikki verður gagnnýttir; men hvørgin brennistøðin framleiðir elorku. Tað er ikki serliga lønsamt at framleiða elorku við smáum brennistøðum, lønandi framleiðsla fæst tá støddin á brennistøðini kemur upp í umleið 3 ferðir tað sum verandi brennistøðir megna at framleiða, t.v.s. umleið 8 tons/tíma.

Vit kunnu sjálvsagt halda fram sum nú, og bert gagnnýta ein lítlan part av orkuni, og lata restina fara ‘upp í royk’. Ein annar møguleiki kundi verið at kanna hvørjar leiðir eru gongdar - um vit hugsa okkum at til ber at fáa meir burturúr ruskinum. Fyrsta fortreytin – harra borgarstjóri - er at vit øll eru opin fyri at hugsa øðrvísi og síggja avbjóðingarnar sum møguleikar. Samferðslukervið er munandi útbygt seinnu árini, og verður framhaldandi útbygt. Tað kann hugsast at hetta er við til at broyta fortreytirnar fyri skilagóðari handfaring av ruski í Føroyum.

Samstarvið millum limakommunurnar í IRF er gott dømi um at til ber at náa langt við góðum samstarvi. Tá júst samtykta íløgan í brennistøðina á Hagaleiti er gjøgnumførd um eitt ár, verður mett at brenniorkan er nøktandi komandi 10-12 árini, tá er vakstrar framskrivingin sett til 3% árliga.

Tað ber ikki til at vaksa verandi ovnar hjá IRF og KOB meira uttan at gera heilt nýggjar brennistøðir, sostatt skal ein munandi útbygging gerast um eini 10 ár – t.v.s. 2018. Tá henda er gjørd, kann ikki væntast at aktuelt er at umrøða møguligar bygnaðarbroytingar aftur fyrr enn í fyrsta lagi um eini 40 ár. Tí er rætt at gera nakrar meira grundleggjandi ætlanir nú, soleiðis at røtt avgerð verður tikin um eini 5 ár, tá støða skal takast til nýggjar íløgur bæði hjá Tórshavnar kommunu og IRF.

Fyrsta fortreyt, fyri einum møguliga breiðari samstarvi enn tað núverandi, er at Tórshavnar Kommuna kemur við í samstarvið við hinar kommunurnar í Føroyum. Tá ber til at gera eina eind, har fyrimunirnir eru:

Burðardyggari gagnnýtsla úr ruskinum, t.v.s. bíligari og betur fyri umhvørvið og allar borgarar í Føroyum.

Ein eykavinningur við eini slíkari verkætlan er, at munandi mongdir av ravmagni kunnu framleiðast burtur úr ruskinum, og harvið verður hetta eitt íkast til samfelagsbúskapin og umhvørvisvernd. Sambært grein hjá www.jardfeingi.fo eru fyrimunirnir við eini stórari brennistøð har elorka og fjarhiti verða gagnnýtt at: - oljunýtslan í Føroyum minkar eini 9.000 tons, $CO_2$ útlátið minkar eini 25.000 tons árliga. El-framleiðslan kann vera á hædd við eini 10 vindmyllur á stødd við tær á Mýrunum.

Tey sum keypa fjarhitan og streymin skulu sjálvsagt gjalda marknaðarprís fyri orkuna. Tað er vanligt aðrastaðni, at búsetingar og virki í einum øki, sum fær fjarhita hava skyldu at keypa fjarhita sambært byggisamtyktini í økinum. Í Danmark er vanligt at brennistøðir hava umleið 30-40% av inntøkunum frá sølu av fjarhita og ravmagni. Sostatt verða tað allir borgarar í Føroyum, sum fyrst og fremst fáa ágóðan av tí at inntøkan kemur interkommunala felagsskapinum tilgóðar, og harvið ein bíligari skipan samanlagt.

**Staðseting**

Staðsetingin av eini framtíðar brennistøð eigur einans at vera avgjørd av, hvar samanlagdi fíggjarligi fyrimunurin er størstur. Fyri at svara hesum spurninginum er neyðugt at gera eina umfatandi kanning av fleiri viðurskiftum, m.a. hvar best slepst av við fjarhitan og streymin og hvar bíligasta innsavningarskipan fæst. Harumframt er neyðugt at hyggja eftir teimum íløgum, sum longu eru gjørdar á Hagaleiti og Sandvíkahjalla, og øðrum viðurskiftum, sum møguliga ikki eru komin fram. Samanumtikið kann sigast at rættast er at ein óvilduga kanning av samanløgdu fyrimununum og vansunum eiga at avgera staðsetingin. Ídag kann staðfestast, at útlitini frá brennistøðunum eru ikki nakar vandi fyri nærumhvørvið.

Við IRF á odda megnar føroyska samfelagið á ein burðardyggan hátt at handfara ta alsamt vaksandi nøgdina av burturkasti. IRF tryggjar eisini, at einki øki í landinum verður forsømt, tá ið talan er um innsavning og flutning av burturkasti í Føroyum. Eitthvørt modernað samfelag er treytað av eini effektivari burturbeiningarskipan. Samstundis áliggur tað okkum at skipa so fyri, at so nógv av burturkastinum sum gjørligt kann endurnýtast.

# Um 25 árahaldið í Norðurlandahúsinum o.a.

ALMA BJARTALÍÐ
Klaksvík

Táið Norðurlandahúsið lat upp á sinni, var eg við tann fyrsta dagin. Var so spent at síggja húsið og frætta okkurt um, hvat ætlanin var at gera har. Tað var ein stór løta. Og síðan tá havi eg ofta vitjað niðan til ymisk tiltøk. Eitt frálíkt hús, sum avgjørt hevur stuðlað føroyskari mentan.

Tað gleddi meg, at Kringvarpið fór at senda beinleiðis frá hátíðarhaldinum. Harvið fingu vit jú kensluna av, at hetta eiga vit øll lut í. Tøkk skal Kringvarpið eiga fyri tað.

Ikki sørt tú rætti teg upp, tá okkara sniðgevar vístu okkum, hvat tær duga. Tað var stuttligt at síggja, - og flott eisini. Bundnu troyggjurnar vóru sera vakrar.

Síðan komu ymsu tættirnir hvør eftir øðrum: føroyskur barnadansur, solodansur, føroyskur tónleikur, sangur o.s.fr. Fjølbroytt og gott. Stuttligt at síggja filmklippini úr søgu Norðurlandahúsins. Tú eins og fleyg ígjøgnum hesi 25 árini. Tað var væl samansett.

Og vit fingu ordiliga at síggja, hvussu væl stóra ljósútgerðin riggar, tá dugnaligar hendur standa fyri. Sjónvarpið vísti eisini, hvat tey megna. Vit fingu allan pallin við, - bæði nærmyndir og í fjarstøðu. Frálíkt.

Eg frøddist um løtuna og var so væl nøgd við alt, tá vertirnir søgðu farvæl og takkaðu fyri seg. Men tá kom eitt uppískoyti, sum spilti kvøldið. Tað var á so lágum støði, at hatta var betur ógjørt. Spell, at fyrireikararnir valdu ein so slíkan enda á einum annars frálíkum kvøldi.

Og nú frættist, at stórt barnatiltak verður í Havn í juli við ymsum undirhaldi.

Ein av teim, sum stendur fyri hesum tiltaki, er júst ein partur av uppískoytinum, sum endaði kvøldið í Norðurlandahúsinum. Hvat stendur so børnunum í boði?

Við tøkk fyri upptøkuna.